**Heilsumálaráðið**

**Lógartænastan**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | Skrivið her |
| Mál nr.: | 20/00779-8 |
| Málsviðgjørt: | KG |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

# Kunngerð um ókeypis koppseting ímóti ávísum sjúkum

Við heimild í § 2, stk. 1 í løgtingslóg nr. 118 frá 12. desember 2007 um ókeypis koppseting ímóti ávísum smittandi sjúkum og § 15 í løgtingslóg nr. 104 frá 5. september 1988 um apoteksverkið og heilivág, verður ásett:

**§ 1.** Tilboð um ókeypis koppseting ímóti ávísum smittandi sjúkum verður veitt persónum, ið eru búsitandi í Føroyum.

*Koppseting til børn*

**§ 2.** Børn og ung, yngri enn 18 ár, kunnu verða koppsett ókeypis ímóti kikhosta, difteritis, stívkrampa og polio.
*Stk. 2.* Børn og ung, yngri enn 18 ár, kunnu verða koppsett ókeypis ímóti meslingum, fárasjúku og reydlingum. Koppsetingin verður bjóðað sum ein samansett MFR-koppseting.
*Stk. 3.* Børn, yngri enn 6 ár, kunnu verða koppsett ókeypis ímóti Hæmophilis influenzae, typa b (Hib).
*Stk. 4.* Børn, yngri enn 2 ár, kunnu verða koppsett ókeypis ímóti pneumokoksjúku.

*MFR-koppseting til vaksin*

**§ 3.** Kvinnur, sum hava fylt 18 ár, kunnu verða koppsettar ókeypis ímóti reydlingum. Koppsetingin kann t.d. verða bjóðað sum ein MFR-koppseting.
*Stk. 2.* Persónar, ið hava fylt 18 ár, sum ikki hava havt meslingar og ikki eru koppsettir ímóti meslingum, kunnu verða koppsettir ókeypis ímóti meslingum. Koppsetingin verður bjóðað sum ein MFR-koppseting.

*HPV-koppseting*

**§ 4.** Kvinnur í aldrinum 12-27 ár kunnu verða koppsettar ókeypis ímóti humant papillomavirus HPV. Dreingir í aldrinum 12-17 ár kunnu verða koppsettir ókeypis ímóti humant papillomavirus HPV.

*Koppseting ímóti influensu*

**§ 5.** Tilboð um ókeypis koppseting ímóti influensa verður veitt hesum persónum:

1) Persónar, ið hava fylt 65 ár.
2) Fyritíðarpensjónistar.
3) Persónar, sum hava eina av hesum varandi sjúkum, ið eru nevndar undir litra a-g, eftir eini læknaligari meting:
   a) Persónar, sum hava varandi lungnasjúku.
   b) Persónar, sum hava hjarta- og æðrasjúku, undantikið hækkað blóðtrýst við ongari sjúku annars.
   c) Persónar, sum hava diabetes 1 ella 2, sukursjúku.
   d) Persónar, sum hava órinsbrek, immundefekt, ið antin eru viðfødd ella íkomin.
   e) Persónar, har andadrátturin er ávirkaður av, at vøddamegin er niðursett.
   f) Persónar, sum hava varandi livrasvigna og nýrasvigna.
   g) Persónar, sum hava aðra varandi sjúku, og har læknin heldur, at heilsustøðan er av slíkum slagi, at influensa hevur við sær álvarsligan heilsuvanda.
4) Persónar við ovurfiti, vegleiðandi BMI > 40, eftir eini læknaligari meting.
5) Persónar, sum hava aðra álvarsliga sjúku, og har læknin metir, at heilsustøðan er av slíkum slagi, at influensa hevur við sær álvarsligan heilsuvanda.
6) Barnakonur frá 13. barnsburðarviku.
7) Húski hjá sjúklingum við nógv niðursettari órinsverju, sum antin er viðfødd ella íkomin, sbrt. nr. 3, litra d, eftir eini læknaligari meting.
8) Starvsfólk i heilsu- og umsorganarøkjum, sum arbeiða við røkt, umsorgan og viðgerð av borgarum, sum eru i serligum vandabólki fyri at fáa álvarsamar sjúkugongdir vid influenza sbrt. stk. 1-7 og sum eru nevnd i litra a til dd:
   a) Serlæknar
   b) Læknar uttan serlæknagrein
   c) Sjúkrarøktarfrøðingar
   d) Farmaceutar
   e) Kiropraktorar
   f) Tannlæknar
   g) Úrspenningarpedagogar
   h) Bandagistar
   i) Bioanalytikarar
   j) Ergoterapeutar
   k) Fysioterapeutar
   l) Ljósmøður
   m) Kliniskir dietistar
   n) Optometristar
   o) Radiografar
   p) Audiologpedagogar
   q) Farmakonomar
   r) Fótterapeutar
   s) Neurofysiologassistentar
   t) Tannlæknaassistentar
   u) Tannrøktarar
   v) Tanntøkningar
   w) Ítrívsvegleiðarar
   x) Røktarar
   y) Røktarheimsassistentar
   z) Heilsurøktarar
   æ) Sjúkrahjálparar
   ø) Sálarfrøðingar
   å) Læknaskrivarar og aðrir skrivarar í heilsuverkinum
   aa) Portørar
   bb) Sjúkraflutningsviðgerðar
   cc) Sjúkraflutningsførarar
   dd) Paramedisinarar

*Stk. 2.* Koppseting verður veitt sum ein 4-valent influensakoppseting, smbr. tó stk. 3.

*Stk. 3.* Koppsetingin til persónar, sum hava fylt 85 ár, áðrenn 15. januar 2021, verður veitt sum ein 3-valent háskamtur, højdosis, influensakoppseting.

*Koppseting ímóti hepatitis*

**§ 6.** Innsprænigar rúsevnismisnýtarar, injektiónsnarkomanar, sum ikki hava verið smittaðir við hepatitis B, kunnu verða koppsettir ókeypis ímóti hepatitis B. Koppsetingin verður veitt sum ein samantvinnað koppseting, sum eisini verjir

ímóti smittu við hepatitis A. Henda koppseting verður veitt uttan so, at hon læknafakliga verður hildin at vera óhóskandi.
*Stk. 2.* Persónar, sum búgva saman við einum persóni við hepatitis B ígerð, og fastir kynspartnarar hjá einum persóni við varandi hepatitis B ígerð, kunnu verða koppsettir ókeypis ímóti hepatitis B. Persónar, sum eru yngri enn 18 ár, fáa eina samantvinnaða koppseting, sum samstundis verjir ímóti smittu við hepatitis A. Henda koppseting verður veitt uttan so, at hon læknafakliga verður hildin at vera óhóskandi.
*Stk. 3.* Persónar, sum hava fingið staðfest hepatitis C ígerð, kunnu verða koppsettir ókeypis ímóti hepatitis B. Koppsetingin verður veitt sum ein samantvinnað koppseting, sum samstundis verjir ímóti smittu við hepatitis A. Henda koppseting verður veitt uttan so, at hon læknafakliga verður hildin at vera óhóskandi.
*Stk. 4.* Børn á dagstovnum kunnu verða koppsett ókeypis ímóti hepatitis B, um so er, at eitt barn á stovninum hevur eina staðfesta hepatitis B ígerð. Landslæknin metir um, hvørji børn á dagstovninum skulu fáa tilboð um koppseting.
*Stk. 5.* Børn yngri enn 15 ár, sum koma í bústaðarøki, har tilburður av hepatitis B ígerð er staðfestur, kunnu verða koppsett ókeypis ímóti hepatitits B, um Landslæknin mælir til, at tey verða koppsett. Koppsetingin verður veitt sum ein samantvinnað koppseting, sum samstundis verjir ímóti smittu við hepatitis A. Henda koppseting verður veitt uttan so, at hon læknafakliga verður hildin at vera óhóskandi.
*Stk. 6.* Børn yngri enn 2 ár, sum eru fødd av kvinnu við varandi hepatitis B ígerð, kunnu verða koppsett ókeypis ímóti hepatitis B.

*Koppseting ímóti kikhosta til barnakonur*

**§ 7.** Tilboð um ókeypis koppseting ímóti kikhosta verður veitt hesum persónum:
1) Barnakonum, sum eru í viku 32.
2) Barnakonum, sum eru í viku 33-39, tá tilboðið kemur í gildi.
3) Barnakonum, har læknafakliga verður hildið, at vandi er fyri barnsburði áðrenn viku 32.

*Koppseting ímóti pneumokokkum til ávísar persónar*

**§ 8.** Tilboð um ókeypis koppseting ímóti pneumokokkum verður veitt til fylgjandi persónar, ið eru búsitandi í Føroyum:
1) Persónar, sum fáa bútilboð, sum eru skipað sambært §§ 27, 32 og 32 e í forsorgarlógini og sambært § 13, stk. 2, nr. 1, 2 og 3 í løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m.
2) Persónar, sum hava fylt 65 ár.
3) Persónar, sum hava eina av hesum varandi sjúkum, ið nevndar eru undir litra a-h, eftir eini læknaligari meting.
   a) Persónar uttan milt, ella har miltið ikki virkar, sum tað skal.
   b) Persónar, har andadrátturin er ávirkaður av, at vøddamegin er niðursett.
   c) Persónar, sum hava órinsbrek, immundefekt, ið antin er viðfødd ella íkomin.
   d) Persónar við leka av heilavætu, liquor-lækage.
   e) Persónar, sum hava havt invasiva pneumokoksjúku, pneumokokkbruna í blóðinum ella pneumokokk-meningitis.
   f) Persónar, sum hava fingið Cochlear implantatión.
   g) Persónar, sum hava fingið upprunakyknuflutning, stamcelletransplantation.
   h) Persónar, sum hava fingið yrkisgagns-flutning, organtransplantation.
4) Persónar yngri enn 18 ár, sum hava sjúku ella støðu, ið hevur við sær sera stóran vanda fyri at fáa invasiva pneumokokk sjúku, ið eru nevndar undir litra a-h, eftir eini læknaligari metan.

a) Persónar við hjartasjúku, ið hevur við sær niðursetta iltmettan í blóðinum, cyanotiske hjertesygdomme.
b) Persónar, sum hava hjartaviknan, hjerteinsufficiens.
c) Persónar, sum hava fingið palliativa skurð-viðgerð fyri hjartasjúku.
d) Persónar, sum hava týðandi fylgir á blóðrenslið eftir hjartaskurðviðgerð.
e) Persónar við varandi lungnalíðing, t.d. cystiska fibrosu.
f) Persónar, sum hava niðursett lungnavirkni, orsakað av veikum andadráttsvøddum, hypodynamisk respirationsinsufficiens.
g) Persónar, sum hava nefrotisk sjúkueyðken-ni, nefrotisk syndrom.
h) Persónar, sum hava órinsverjubrek, immundefekter, undantikið agammaglobulinæmi og SCID.

5) Persónar, sum hava aðrar álvarsamar sjúkur ella eru í eini hættisligari støðu, sum eftir ítøkiligu meting læknans, hevur við sær sera stóran vanda fyri at fáa invasiva pneumokokksjúku.

*Stk. 2.* Koppsetingin verður veitt sum ein 23-valent pneumokokk koppseting.
*Stk.* 3. Koppsetingin eftir stk. 1, nr. 2-4, verður veitt til persónar, sum ikki eru koppsettir seinastu 6 árini, ella eftir eini læknaligari meting við støði í eini andevnismáting, antistofmåling.

*Apoteksverkið*

**§ 9.** Apoteksverk Føroya hevur skyldu til altíð at hava eina nøktandi mongd av vaksinu á goymslu, ið skal nýtast til koppseting ímóti teimum í §§ 2-8 nevndu sjúkum.

*Koppsetingar*

**§ 10.** Kommunulæknar, sum Heilsutrygd hevur sett í starv, kunnu koppseta ímóti teimum í §§ 2-8 nevndu sjúkum.

**§ 11.** Koppsetingarnar verða framdar samsvarandi vegleiðingum frá Sundhedsstyrelsen.

*Útreiðslur*

**§ 12.** Landskassin rindar kommunulæknum, sum eru starvssettir hjá Heilsutrygd, samsýning fyri at koppseta.

**§ 13.** Landskassin rindar útreiðslurnar til vaksinur, ið skulu nýtast til koppseting ímóti teimum í §§ 2-8 nevndu sjúkum, tá koppsetingin fer fram hjá kommunulækna.

*Gildiskoma*

**§ 14.** Henda kunngerð kemur í gildi 1. oktober 2020. Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 126 frá 2. desember 2015 um ókeypis koppseting ímóti ávísum sjúkum, sum seinast broytt við kunngerð nr. 125 frá 30. juli 2020.
*Stk. 2.* Koppseting eftir § 5 kemur í gildi 1. oktober 2020 og verður í gildi til 15. januar 2021, smb. tó stk. 3.
*Stk. 3.* Tilboð til kvinnur, sum eru við barn, sbrt. § 5, nr. 6, og persónar, sum hava niðursetta órinsbrek, sum antin er viðfødd ella íkomin, sbrt. § 5, nr. 3, litra d, og persónar í húski teirra, sbrt. § 5, nr. 7 er galdandi til 1. mars 2021.

Heilsumálaráðið, dagfesting

**Kaj Leo Holm Johannesen**
landsstýrismaður

Turid Arge / Navn á embætisfólki